# Ársfundur hjá Ferðslutrygd



Hósdagin fer Ráðið fyri Ferðslutrygd at hava ársfund. Umframt formella partin fyrrapartin er ætlanin at varpa ljós á Ferðslutrygdarætlanina, sum varð handað landsstýrismanninum í ferðslumálum seinasta heyst. Serliga verður dentur lagdur á tilmælið um gerð av kommunalum ferðslutrygdarætlanum. Ætlanin er at hava tríggjar fyrilestrar, ið kunnu stiðja undir arbeiði við at gera slíkar ætlanir. Britt-Mona Vang, úr Karmøy Kommune í Norra, kemur á vitjan og greiðir frá teirra arbeiði við at gera eina kommunala ferðslutrygdarætlanin. Eisini vitja umboð fyri Landsverk og LBF og greiða frá teirra arbeiði í ávikavist Miðvági-Sandavági og Tvøroyri. At enda verður kjak. Ráðið fyri Ferðslutrygd vónar við hesum at seta gongd á arbeiðið við at gera lokalar ferðslutrygdarætlanir kring landið.

# Aðalfundur hjá Føroya Ellisakførum

Leygardagin 5. apríl kl. 16 verður aðalfundur hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør í hølum felagsins Yviri við Strond. Skráin verður sambært viðtøkum felagsins. Tveir av nevndarlimunum, Hans Korsgaard og Páll Danielsen, standa fyri vali. Eftir fundin verður smyrjibreyð og annað gott, sigur Eiriki Ó. Simonsen, formaður í Føroya Ellisakførum. Heimasíðan hjá felagnum er: www.ellisakfor.com

# Ferðslutrygd er ein skilagóð íløga

**Vit eiga at raðfesta ferðslutrygdina høgt, sigur Eyðun Berg, politistur, sum arbeiðir við ferðslumálum og er knýttur at ferðslupatruljuni hjá løgregluni. Hann tekur fult undir við, at ferðslutrygdin kundi verið nevnd í samgonguskjalinum**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Eyðun Berg politistur arbeiðir við ferðslumálum og er knýttur at ferðslupatruljuni hjá løgregluni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í sambandi við eina blaðgrein sum Rúna Sivertsen, fyrrverandi formaður í Ferðslutrygd, skrivaði beint eftir at nýggja landsstýrið var skipað, heldur Eyðun Berg politistur, at talan var um eina grein, sum hann í høvuðsheitum kann taka undir við.

Greinin snúði seg um, at einki varð sagt um ferðslutrygdina í nýggja samgonguskjalinum. Rúna nevndi m.a. at hóast tað ferð eftir ferð verður gjørt vart við, at ferðsluvanlukkur eru størsta hóttanin ímóti fólkaheilsuni, var ikki eitt orð at finna um ferðslutrygd í samgonguskjalinum.

Eyðun Berg, ið starvast sum politistur í fyrisitingini hjá politinum og arbeiður m.a. við ferðslumálum umframt at hann eisini er knýttur at ferðslupatruljuni, sigur, at ferðslutrygdin eigur at síggjast í verki hjá landsins leiðslu. Um ferðslutrygdarætlanin stóð í samgonguskjalinum, hevði tað verið eitt gott signal. Tó skal sigast, at nógv er og verður gjørt á ferðslutrygdarøkinum, men tá vit tosa um fyribyrging kann, ikki gerast ov nógv.

### Klippikortskipanin

Eyðun Berg hevur verið við í arbeiðnum at innføra klippikortsskipanina, sum hann heldur í sær sjálvum er ein trygdarskipan í ferðsluni. Hann sigur, at tað er av stórum týdningi, at hildið verður fram við tí fyribyrgjandi arbeiði, sum Ferðslutrygd stendur fyri. Í mong ár hevur Ferðslutrygd skipað fyri skeiðum fyri næmingum í miðnámsskúlunum. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við ferðsluoffur, ambulansafólk, koyrilærarar, politi og onnur. Hetta er eitt sera gott tiltak, serliga tí at ferðsluvanlukkur raka mest ungdómin. Tey ungu eiga størsta partin av deyðsvanlukkunum sum tíverri henda, og oftast eru tað ungir dreingir, sum verða raktir.

Tað hevur stóran týdning at myndugleikarnir ræðfesta ferðslutrygd høgt, bæði í játtanum og gerðum. At Ráðið fyri Ferðsltrygd hevur góðar arbeiðsumstøður hevur eisini stóran týdning. Tað kundi verið verið ein fyrimunur um arbeiðsplássið hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd fysiskt varð lagt saman við øðrum stovnum, sum arbeiða við fyribyrging, soleiðis kundi eitt fakligt umhvørvi verið við til at ment arbeiði. Soleiðis at skilja at alt sum hoyrir undir fyribyrging kundi verið undir einum taki, uttan at talan verður um nakrar bygningarbroytingar, sigur Eyðun.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur verið frammi við, at ein skaðanevnd átti at verið sett. Hetta tekur Eyðun fult undir við. Uttan iva vildi nógv vitan komi fram, sum vit ikki kenna í dag, við at álvarslig ferðsluóhapp vórðu kannað. Ein skaðanevnd kundi eisini havt fokus á vegakervið, sum ikki er so trygt allastaðni.

Eyðun heldur, at vit helst mugu síggja í eyguni, at ferðslulógin bara herðist sum tíðin gongur, krøvini vera alsamt størri til bilførarar, kanska einamest til hugburðin.

Frá at vera ein rættur at hava koyrikort, sum vit kenna tað í dag, verður tað kanska soleiðis at tað heldur at verið ein møguleiki, um fólk yvirhalda tær grundleggjandi treytirnar í ferðslulógini. Ferðslan økist og gert alt meira hættislig, samstundis sum ferðsluvanlukkurnar gerast fleiri og ógvusligari. Tí mugu vit øll standa saman í hesum álvarsliga máli, sum ferðslutrygdin er. Av tí at ferðslan er nógv, og trongligt er í gøtunum, kann tað vera skjótt at fólk í einum hektiskum dagligdegi gerast strongd, hava stutt fjús og kunnu t.d. finna upp á at gera hættisligar yvirhálingar, sum kunnu hava álvarsligar fylgjur við sær.

### Øll við í ferðsluni

Vit eru øll við í ferðsluni á ein ella annan hátt, um vit koyra, súkkla ella ganga. Tey sum ikki eru beinleiðis úti í ferðsluni eiga familju og avvarðandi, sum dagliga ferðast í ferðsluni. So ferðsluvanlukkur kunnu raka øll í samfelagnum. Faktist rakar ein álvarsom ferðsluvanlukka okkum øll í einum lítlum samfelað sum okkara, her vísir Eyðun til, at øll hoyra ella lesa um vanlukkur í fjølmiðlunum.

Nógv er hent á ferðsluøkinum seinastu árini, klippikortskipanin sum Ferðslutrygd eigur sín leiklut í, er komin í gildi, og er hon eitt stig á vegnum. Tað er eisini positivt, at ein ferðslutrygdarætlan er gjørd fyri Føroyar, men vit mugu ikki steðga har. Ferðslulógin treingir til at vera endurskoðað, í summum førum er hon ófullfíggjað.

Tað er týdningarmikið at halda lív í kjakinum um ferðslutrygdina, soleiðis at fólk vera mint á álvaran í tí at handfara eitt motorakfar, at tey læra at tilpassa seg og yvirhalda ferðslulógina. Eyðun heldur, at síðani klippikortssipanin var sett í verk, hevur hann merkt ein sera positivan og broyttan hugburð millum fólk.

### Koyribreyt

At enda vísir Eyðun á, at vit áttu at fingið tað nógv umtalaðu koyribreytina. Tað vísir seg, at eingin tekur ábyrdina upp á seg og ger nakað ítøkiligt. Eyðun heldur, at landsins myndugleikar áttu at takið stig til, at koyribreytin bleiv gjørd við at stuðla eini slíkari verkætlan. Breytin kundi endaliga verið á privatum hondum og verið rikin á handilsligum grundarlag. Fleiri koyriteknisk anlegg í Danmark eru seinnu árini farin á privatar hendur, sigur Eyðun Berg, sum leggur dent á, at tað sum hann sigur í hesi greinini eru hansara egnu sjónarmið.